# Tungvektarar halda fyrilestur í Kelduni

**Týsdagin verða fýra áhugaverdir fyrilestrar hildnir í Kelduni í Skálafirði. Ein av fyrilestrahaldarunum er norðmaðurin, Ragnar Nystøyl. Hann arbeiðir fyri fyritøkuna Kontali Analyser, ið er kend um allan heim fyri sínar greiningar og metingar av framtíðini innan fiski-og alivinnu**



*Stefán Jón Friðriksson, deildarleiðari í íslendska fíggjarmálaráðnum*



*Gordon Rajani, Eik Banki, keyp og søla av fyritøkum*



*Leif Bergman, stjóri í Henley Management College í Onglandi*



*Ragnar Nystøyl, norðmaður sum arbeiðir hjá CEO, Kontali Analyser*

**FAROEXPO 07**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Keldan í Skálafirði verður karmur um fyrilestrarnar, sum er ráðstevnuparturin av FaroExpo. Hesir verða hildnir týsdagin 30. oktober, og lagt verður fyri klokkan 12.30. Eftir hvønn fyrilestur, sum eru fýra í tali, verður høvi hjá áhoyrarum at seta spurningar.

Teir, sum fara at halda fyrilestur, eru:

Gordon Rajani úr EIK banka, sum fer at tosa um keyp og sølu av fyritøkum.

Stefán Jón Friðriksson, deildarleiðari í íslendska fíggjarmálaráðnum, sum fer at tosa um einskiljing av almennum fyritøkum.

Ragnar Nystøyl, norðmaður sum arbeiðir hjá CEO, Kontali Analyser. Hann fer at tosa um evropeiskt og altjóða rák í sambandi við laks og hvítan fisk.

Leif Bergman, stjóri í Henley Management College í Onglandi, fer at tosa um evnið, sum hann kallar "Building people - Building business".

Virkisráðgevingin, sum samskipar FaroExpo, heldur, at allir hesir fyrilestrarnir eru sera viðkomandi.

- Ragnar fer at hugleiða um, hvørji rák eru innan sjómat, bæði í Evropu og um heimin annars, og hann fer eisini at hugleiða um rákið innan framleiðslu og marknað fyri laksaúrdráttum. Norðmaðurin fer at meta um, hvussu rákið fyri tosk og annan hvítan fisk í Evropa verður. Kontali Analyser er kend um allan heim fyri sínar greiningar og metingar av framtíðini innan fiski-og alivinnu í Norðuratlantshavi og kring um heimshøvini.

Virkisráðgevingin sigur, at Stéfan fer at tosa um sølu av almennum fyritøkum, sum er eitt sera aktuelt evni í Føroyum í dag.

- Stéfan fer at tosa um sambandið millum almenna og privata sektorin í sambandi við keyp av almennum ognum og tænastum. Hann fer at greiða frá, hvussu handilin fer fram millum privatar og almennar fyritøkur í Íslandi. Stéfan fer eisini at greiða frá gongdini at einskilja almennar fyritøkur í Íslandi.

Leif Bergman fer at tosa um, at ein leiðsla skjótt kann renna seg í eina røð av tvístøðum, tá avgerðir skulu takast, og hesar avgerðir verða eins nógv ávirkaðar av persónsmenskum, sum av førleikanum hjá leiðaranum.

- Hann fer at vísa á, hvussu leiðarar kunnu mennast til at velja rætt fyri seg sjálvar, fyritøkuna og fyri framtíðar íleggjarar.

Virkisráðgevingin sigur, at Gordon Rajani fer at greiða frá, hvussu tað ber til, at Eik Banki er tað felag, sum er vaksið skjótast í Føroyum. Bankin er eisini byrjaður við eini nýggjari tænastu, sum er at ráðgeva fyritøkum í keypi og sølu.

Hvussu kann ein fyritøka brúka hetta sum eina vakstrarstrategi ella kanska sum eina umleggingarstrategi, er ein av spurningunum, sum Gordon Rajani fer at royna at svara, sigur Virkisráðgevingin um fyrilestrarnar í Kelduni.

Ætlandi verður fyrilestrarrøðin í Kelduni liðug um 16.30-tíðina.

## FAKTA

Fyrilestrarnir í Kelduni eru fýra í tali, og teir eru almennir.

Luttøkugjaldið er 520 krónur. Tað kann í prinsippinum rindast við dyrnar, men best er, um tað verður goldið um heimasíðuna www.faroexpo.fo

Eftir hvønn fyrilestur er høvi hjá áhoyrarunum at seta spurningar



*Fríggjakvøldið 2. november hevur Handilsmiðdepilin í Runavíkar kommunu "open by nigth" – og dagin eftir er langur leygardagur*

# Open by night og langur leygardagur

**Í sambandi við, at FaroExpo og Mentanarvika er í Runavíkarøkinum í komandi viku, tekur Handilsmiðdepilin eisini sín virknað lut**

**FAROEXPO 07**
*Vilmund Jacobsen*

Runavíkar kommuna hevur eitt ríkt handilslív, sum hevur stóra ávirkan á býarlívið í økinum.

Handlarnir, sum eru partur av Handilsmiðdeplinum, hava sæð tað sum ógvuliga avgerandi úteftir, at teir marknaðarføra seg í felag.

## Fjølbroytt útboð

Tað eru einir 50 handlar í økinum. Av hesum eru umleið 30 limir í Handilsmiðdeplinum, sum saman bjóða fram sítt fjølbroytta vøruútboð.

Í Runavíkar-økinum ført tú at kalla alt, sum tú hevur brúk fyri.

Handilsmiðdepilin skipar regluliga fyri longum leygardøgum, sum vanliga er fyrsti leygardagur í hvørjum mánaði.

Eitt annað av afturvendandi tiltøkunum er "open by night".

Handilsmiðdepilin gevur eisini út felags blað við lýsingum av ymiskum slagi, og miðdepilin er altíð við, tá skipað verður fyri stórum tiltøkum í økinum.

## Eisini hesaferð

Nú Mentanarvika verður í Runavíkar-økinum í komandi viku er Handilsmiðdepilin eisini við.

Fríggjakvøldið 2. november er "open by night" á skránni, og tá verður eisini skipað fyri einum mótakvøldi í Stokkastovuni í Saltangará.

Leygardagin 3. november er so aftur langur leygardagur.

Umframt hetta, sum Handilsmiðdepilin tekur stig til í Mentanarvikuna, skipa fleiri av handlunum eisini fyri smærri tiltøkum.